HOFF STOFF

# rðurlandahúsinum



Bjarni Djurholm tók sær av Mary og Marjun Hanusardóttir hevði krúnprinsin undir hond, tá farið varð upp á gólv.



Hóast tað frammanundan var ivasamt, um tey kongaligu fóru at hava hug at fara upp á gólv, so vóru tey við í ringinum. Her Hendrikur prinsur.





*Eitt orð við á vegnum...*

## *Matskráin á galladøgverðanum*

*Jomfrúhummari við kolturskjøti*

*Bankatoskur við graskerskjarnum*

*Vaniljuhvíti við rabarbum*

*Kaffi og sjokoláta*

*Matskráin á galladøgverðanum var ein lítil ritlingur fyri seg. Gjølla var greitt frá hvaðani ráðvøran var fingin til vega, og um umstøðurnar, har ráðvøran hevði livað.*

*Greitt var frá um serstøku koltursneytini og um kjøtið av teimum. Mynd var eisini viðløgd.*

*Um bankatoskin varð greitt frá, at hann er fingin á Føroya Banka, og at endaliga ráðvøran er eitt úrslit av drúgvum royndum og gjøllum kunnleika innan fiskivinnuøkið.*

*Rabarburnar, sum vóru nýttar til dessertina, hava voksið í Kirkjubø, varð eisini kunngjørt í skrivinum.*

*Leif Sørensen var gingin í lag við kokkarnar á Hotel Føroyum, og saman stóðu teir fyri royala døgverðanum.*



*Borðhaldið var hildið í móttøkuhøllini í Norðurlandahúsinum. Løgtingsmenn, býráðslimir, starvsfólk á løgmansskrivstovuni og onnur vóru boðin*